Lagt til rættis: Eydna Skaale
Myndir: Sunva Eysturoy Lassen

# Rættir menn…
# …ansa sær eftir húð og útsjónd

Mannfólkahúðin er tjykri enn konufólkahúðin, og tí verður hon seinni rukkut. Men tá rukkurnar koma, eru tær djúpri og tískil verri at fáa bilbukt við. Tí er avgjørda ráðið frá øllum húðarserfrøðingum at royna at fyribyrgja rukkunum sum longst. Eru tær komnar, er nevniliga lítið og einki at gera. Tí er tað eitt gott hugskot at nýta pening til eina góða húðrøktarrøð, ið hóskar júst til tína húð, og vera fyrivarin heldur enn eftirsnarin.




## Make up til menn…

…Jú, nú er eisini sminka til mannfólk at fáa. Hetta hittar uttanlands, og er so smátt eisini farið at selja her heima. Og hví skulu tað bert vera konufólk, ið kunnu snýta seg vakrar? Henda spildurnýggja røðin við make-up til menn er frá Biotherm, og hon fæst í Heilsu

Power Bronze Tinted Gel: 299,-
Hvat við at nýta bronzaran, sum gevur eina náttúrliga glóð og fjalir ójavnheitir í húðini. Heldur allan dagin og kann vaskast av aftur um kvøldið.

Correcteur: 259,-
Hevur tú fingið eina irriterandi pirru ella líknandi, tá tað bara ikki mátti henda? Eingin vandi, um tú bert varliga smyr eitt sindur av concealara á.

Power Bronze Matte Powderbrush: 449,-
Um húðin er feittut og glansar ber til at busta eitt sindur av putri á. Tað er sera lætt at fáast við, og putrið kann geva húðini alt frá einum løttum sólbrúnum liti til ein djúpan brúnan lit.

## Vanlig húð – Clinique



Clinique er eitt kent merki, sum veruliga hevur savnað seg um at gera góðar húðrøktarvørur til menn.
Røðin »Skin Supplies for Men« er ein røð hjá Clinique, og produktini fáast bæði til vanliga, turra og feittuta húð.
Allar Clinique vørurnar fáast hjá Drós

Liquid face wash: 225,-
Electric Shave Primer: 180,-
M protect spf 21: 425,-
Face Scrub exfoliant visage: 232,-
Gott undan tøttu rakingini. Smáu kornini gera húðina klára til raking og lyfta skeggið upp. Hjálpir eisini ímóti hárum, ið vaksa inneftir. Reinsar porurnar, Tekur burtur støv og deyðar húðkyknur, sum kunnu geva pirrur.
Maximum hydrator: 406,-
Antiperspirant deodorantstick: 155,-
Non-streak Bronzer: 212,-
Trúðverdig sólbrúnur litur í tubu. Lætt at smyrja á húðina, og verður vaskað av aftur um kvøldið. Gott er at nýta Face-Scrub áðrenn bronzarin verður smurdur á.
Daily Eye Hydrator: 303,-
Clinique sparkle skin: 205,-
Bodyshampoo við kornum, sum taka burt deyðar húðkyknur og gera húðina belyta og mjúka. Kann nýtast av bæði mann- og konufólki.

## Clinique Happy for men



Í røðini "Happy for Men" er góður angi samantvinnaður við góðari húðrøkt.
Angin er lekkur, frískur og maskulinur.
Í røðini eru Antiperspirant Deodorant, Aftershave Balm og Cologne Spray. Deodorantur 186,-
After Shave Balm 386,-
Cologne Spray 367,-

## Sart húð – Medex



Røðin frá Medex hjálpir tær at fáa professionella húðrøkt heima við hús. Vørurnar eru til allar húðtýpur, og kunnu tí eisini nýtast til sarta húð. Medex vørurnar fáast í Cosméto.

Deodorantur: 220,-
Ein langtíðarvirkandi deodorantur, sum heldur í 7-15 dagar eftir nýtslu. Er eisini testaður av einum mannfólka sportsblaði, sum gav deodorantinum sera góð ummæli. Í ummælinum stóð, at virkningurin heldur í 3-7 dagar eftir nýtslu – eisini tá vant verður hart.
After Shave Balm: 318,- • Cleansing Gel: 245,- • Protective Nourishing Gel: 22,- • Active MST Liquid: 599,-

## Giorgio Armani: Attitude



Nýggjasti angin frá Giorgio Armani, nevndur Attitude, hevur ein maskulinan anga. Fløskan er eisini væl sniðgivin, og kann saktans geva damuligu perfumunum mótspæl á baðirúmshyllini.
359,- kr í Heilsu

## Feittut húð – Biotherm

Nógv mannfólk hava trupulleikar av sonevndu T-sonuni, ið er húðin á pannuni, niður eftir nøsuni, um munnin og á høkuni. Hetta er økið á andlitinum, ið oftast er feittut. Tí hevur Biotherm gjørt T-Pur røðina, ið serliga leggur seg eftir at loysa hendan trupulleikan. Biotherm T-zone røðin fæst í Heilsu
T-Pur, Mousse De Rasage purifiante:159,-
T-Pur Intense: 159,-
Andlitsvask, sum ger húðina klára til at verða rakað. Kann tó eisini nýtast einsamalt bæði morgun og kvøld., tí tað reinsar og tekur burtur feitt og støvpartiklar á húðini:
T-Pur intense Lotion Matifante: 299,-
T-Pur Anti-Brilliance: 299,-
High recharge: 449,-
Eitt vætukonsentrat, ið minkar um aldurstekinini í húðini og sum gevur nýggja orku til grovu mannfólkahúðina. Húðin kennist sterkari, fráskari og fær meiri útstráling. Við reinum ginseng og oligo-vitaminum.




## Stramman búk uttan venjing

Abdosculpt: 269,-
Kvinnur hava nýtt tað í fleiri ár, og nú er tað endiliga eisini komið til menn. Uppstrammandi krem til dellur og húðina á búkinum, sum tyngdarmegin hevur fingið tak á. Skal smyrjast á búkin og minkar um feittlagið, samstundis sum tað strammar húðina upp.




## Unisex sjálvbrúnara-serviettar




Ætlar tú at fáa eitt sindur av liti í vetrarmyrkrinum, er sjálvbrúnari ein uppløgd loysn. Comodyne eru serviettar við sjálvbrúnara – ætlaðir bæði konu-og mannfólki, og teir fara væl við húðini.
10 serviettar fáast fyri 85,-, men teir kunnu eisini keypast einkultvís fyri 15,- í Drós